# Skráin fevnir víða í Vági

**Í Vági er vítt til veggja, tá um jóansøkutilboðini ræður. Vit kaga leysliga í skránna og tríva í rúgvuna av tí, ið boðið verður fram**

JÓANSØKA



*Nýtt og gott gamalt er ein av serstøku handlunum í Vági og sum heild eru ikki nógvir handlar av hesum slag í Føroyum*



*Bowlinghøllin er eitt av støðunum í Vági, at til ber at hugna sær og fáa eina bita, men nevnast kunnu eisini t.d. Hotel Bakkin, Messan og Pizzakøkurin*



*Sigurd Gudmundsen bjóðar upplivingar á fjørðinum, m.a. við skjóttgangandi bátinum Scorpion*

Fríggjadagin byrjar Jóansøkan 2008 klokkan 15, tí tá lata ymsu framsýningarnar upp. Tivoli letur upp klokkan 19 og tá er eisini old-boys dystur millum VB/Sumba og TB. Ein av forvitnisligu framsýningum byrjar klokkan 19 og har hava kend fólk gjørt málningarnar.

**Aftankvirra á fyrsta sinni**

Sum altíð, so eru tiltøk til bæði gamans og álvara. Handlarnir í Vági hava Open By Night til klokkan 22. Klokkan 21 skipa Frelsunarherurin og Sion fyri útifundi við Minnisvarðan.

Klokkan 21:30 verður fyri fyrstuferð skipað fyri aftankvirru í Vágs Kirkju og klokkan 22:00 er sangur og tónleikur við Arnóru Petersen, Hjalmari Magnussen og Dagfinn Olsen, og 22:30 andakt við Theodor Olsen, presti.

Tónleikur er í Stóra Pakkhúsi klokkan 23 við Robert McBirnie og Jógvan Dahl og dansur er á Eiðinum har bólkurin 005 spælir til dansin.

**Leygardagur**

Leygardagurin hevur drúgva skrá. Klokkan 10 hevur Suðuroyar Sunnara Bjargingarfelag tiltak við Garðabrúgv við nýggja bjargingarbátinum LÍV.

Fótbóltur er klokkan 12:30.

Seinnapartin er m.a andlitsmáling á skránni, eins og skrúðgonga og klokkan 14:00 setir Ingeborg Vinther jóansøkuna 2008.

Framsýningar halda fram leygardagin eins og tivoli. Kappróður er eisini á skránni, eins og konsertir við Manskórinum. Meira fótbóltur er klokkan 17:30 og klokkan 18 er møguleiki at royna skjóta bátin Scorpion og MB Siri til leigutúr á fjørðinum við ymsum vatnsporti.

Klokkan 20:30 hevur Missiónshúsið útifund við Minnisvarðan. Klokkan 21 spælir Trygvi Strøm í Stóra Pakkhúsi.

Klokkan 21 skipa Frelsunarherurin og Sion fyri útifundi við Minnisvarðan.

Uppboðssøla av málningum, ið kendu fólkini hava málað verður klokkan 22:30 í Essinum.

Føroyskur dansur er í Jómsborg klokkan 23:00. Og um somu tíð spæla Kim Hansen og Terji Rasmussen í Stóra Pakkhúsi. Tá byrjar eisii dansur við bólkinum 005 á Eiðinum.

Klokkan 23:30 er "syngið við" við posthúsið og Svenn Olsen heldur midnáttarrøðu og aftaná er fýrverk. Klokkan 00:30 er dansur í Framtíðini við TRIO og Hans J. Hjelm.

**Sunnudagur**

Dagurin byrjar við gudstænastu í Vágs Kirkju við Jónsvein Bech, presti. Ljómur luttekur og sent verður beinleiðis í ÚF.

Framsýningar halda fram og mong av undanfarnu tiltøkum eru á skránni.

Klokkan 15. er ponyríðing á Sandinum og geitir við lombum verða at síggja.

Tónleikur er í Stóra Pakkhúsi klokkan 20 við Froðbiar Sóknar Bluesorkestri.

Klokkan 21 er "syngið við" í Missiónshúsinum og klokkan 23 spælir Finnur Jensen í Stóra Pakkhúsi.

Umframt skránna, eru vanligu støðini í bygdini opin, so sum matstøð, handlar, bowlinghøll og annað.

---

# Torgið broytir býarmyndina



*Fyrr...*

*....og nú*

**At vágbingar og suðuroyingar sum heild hava fingið nýggjan og stóran handilsbygning, broytir sjálvsagt eitt sindur í gerandisdegnum, men eisini býarmyndin í Vági er broytt**

BROYTT BÝARMYND
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*
*myndir: Dagfinn Olsen*

Torgið lat upp leygardagin. Torgið er nýggjur handilsbygningur mitt í Vági. Torgið hýsir stórum matvøruhandli, kiosk, og á ovaru hæddini halda tveir handlar til, ein við klæðum frá Sirri og Kansas, og ein gávuhadil, ið hevur merkið Zone. Ætlandi verður ein klædnahandil aftuat á ovaru hæddini. Torg er so eisini í bygninginum við plássi til tiltøk og caféøki.

**Broytt býarmynd**

Men ikki bara innkeypsmøguleikarnir eru broyttir, tí við nýggja Torginum er býarmyndin í Vági ikki sørt broytt.

Nýggi handilsbygningurin stendur á grundini, sum Thorstein Vilhelm átti. Men bilhús og grasvøllur eru horvin og sethúsini eru nú fjald aftanfyri handilsbygningin.

Nú er tað stásiligi handilsbygningurin og parkeringsøkið, ið seta dám á býarmyndina. Ikki er so ofta, at handlar í útjaðaranum halda til í bygningum, ið eru bygdir til endamálið, men við Torginum er so bøtt um hetta. Og jóansøkugestir mugu venja seg við nýggja og stásiliga